# ti til flogskipara



Tommy aftan stýrið á einum av Piper flogførunum hjá danska flogskúlanum, har hann fekk sína útbúgving



*Longu sum 24 ára gamal hevur Tommy Andreasen fingið sína útbúgving sum flogskipari. Og hóast altjóða flogferðslan er í svárari kreppu, hevur hann fingið arbeiði hjá Ryan Air framman fyri fleiri aðrar við drúgvum royndum. Her er Tommy í búnanum hjá bretska lágprís flogfelagnum*

frá teimum á Tórshavnar Maskinverkstaði, og tí bar tað eitt nú til at taka heilsukanningina á Ríkissjúkrahúsinum og onnur ørindi, sum eg skuldi fáa frá honini, áðrenn eg kundi byrja á skúlanum, sigur Tommy Andreasen.

– Eg var ikki liðugur við lærutíðina, men tankarnir vóru langt síðani farnir á flog, sum hann tekur til.

Men endiliga upprann so 3. september 2007, dagurin, hann fekk sveinaprógv, og longu tveir dagar seinni, 5. september, byrjaði hann á Center Air Pilot Academy.

– Eg byrjaði ein mikudag, og tann dagurin gekk við at eta pizza og at koma at kenna hvønn annan, men longu mánadagin eftir var eg fyrstu ferð á flogi, sigur Tommy Andreasen.

Stigvíst lærdi hann at kenna flogførini.

– Tað verður bygt upp á alla tíðina, og teori og praksis fylgjast. Fyrst skal tú gjøgnum eitt grundskeið, ið kallast PPL (Private Pilot Licence), og tá tú hevur fingið tað prógvið, kanst tú flúgva smá, privat flogfør, sigur Tommy Andreasen.

Næsta stigið er stóra og tunga teoretiska útbúgvingin, ið kallast ATPL, ið stendur fyri Airline Traffic Pilot Licence. Hon tekur 10 mánaðar og umfatar 12 ymisk fakøki.

– Tá so teoriin er komin upp á pláss, er ein rúgva av flúgving eftir. Á skúlanum, har eg lærdi, høvdu tey trý sløg av flogførum, Piper Cherokee, sum er eitt lítið eitt-motors flogfar, við føstum landingshjólum, Piper Arrow, ið hevur heldur kraftigari motor og kann taka landingshjólini upp undir seg, og so tvey-motors Piper Seneca flogfarið, sigur Tommy Andreasen.

## Starv hjá Ryan Air

Tað tekur einans tvey ár at útbúgva seg sum flogskipari á CAPA, men tað skal eisini gerast nakað við útbúgvingina.

– Tað ljóðar stutt, men tað var ótrúliga intenst. Vit gingu í skúla um kvøldarnar eisini, leygardagar og enntá heilidagar. Og tá vit so endiliga høvdu frí, máttu vit lesa og studera, so vit høvdu so at siga onga fríløtu. Tá onnur fóru í biograf ella í býin, máttu vit sita inni og studera, sigur Tommy Andreasen.

Hann heldur, at tað hevur bæði sínar góðu og ringu síður.

– Tað ringa var, at vit ongantíð høvdu frí, tað góða, at útbúgvingin var skjótt yvirstaðin, sigur Tommy Andreasen.

Tíðirnar innan flogferðslu vóru ikki góðar, tá Tommy varð útlærdur 7. deseber 2009, og fyri at betra um møguleikarnar at fáa starv, tók hann eitt sonevnt Jet Orientation Course.

– Hetta var fyri at betra um møguleikarnar at fáa starv hjá einum Jet-felagi, tí øll útbúgvingin annars fór fram við propell flogførum, sigur Tommy Andreasen.

Hann søkti sjálvandi beinanvegin hjá Altantic Airways, men har var long bíðirøð av flogskiparum, har fleiri hava royndir við jetflogførum.

– Eg gjørdi so av at fara at arbeiða sum timburmaður, meðan eg bíðaði, sigur Tommy Andreasen.

Tað var ikki fyrr enn út í februar, at honum rann í huga Ryan Air, og hann sendi eina umsókn avstað.

Tað gekk ein vika, til hann fekk boð um at koma til upptøkuroynd.

– Upptøkuroyndin skuldi vera 5. mars, og eg hevði einar 14 dagar til ta tíð, so hesar tvær vikurnar brúkti eg til at lesa frá morgni til myrkurs, fyri at vera so væl fyrireikaður sum gjørligt, sigur Tommy Andreasen.

## Byrjar síðst í august

Øll hendan lesingin kom honum til góða, tá teoriin gekk av tí allarbesta, men teori er ikki nóg mikið einsamøll.

– Ein avgerandi roynd er flogsimilatorurin. Har verður tú testaður, hvussu tú reagerar í ávísum støðum, og hvussu kaldur tú ert í neyðstøðu, sigur Tommy Andreasen.

Átta vóru slopnir gjøgnum nálareygað til upptøkuroynd, tveir flogskiparar og seks stýrimenn.

– Eg varð paraður við einum donskum flogskipara, sum í sínari tíð hevði flogið upp á Føroyar við Mærsk, sigur Tommy Andreasen.

Upptøkuroyndin var fríggjadag 5. mars, og longu týsmorgunin eftir fekk hann felefonboð frá Ryan Air, sum ynskti honum tillukku við starvinum.

Hann byrjaði so hjá Ryan Air 31. mai í ár, men hann skal ígjøgnum drúgva umskúling, áðrenn hann sleppur at sita aftan stýripinnin,

– Sum nevnt fór øll undirvísingin fram við propellu flogførum. Ryan Air nýtir bert Boeing 737/800 flogfør, so tað er sum at fara av brúnni á einum útróðrarbáti, á brúnna á Norrönu, sigur Tommy Andreasen.

Nú vit eru komin út í juli er Tommy liðugur við teknisku umskúlingina, sum er at seta seg inn í, hvussu eitt Boeing 737 er uppbygt. Nú eru tímar og tímar í similatorinum eftir at fáa frá hondini.

– Eg skal gjøgnum 60 tímar í flogsimilatorinum, áðrenn eg eri til reiðar at seta meg við stýripinnin á einum veruligum flogfari, sigur Tommy Andreasen.

Ryan Air er eitt lágprís flogfelag, og tað vil siga, at teir einans flúgva upp á frítíðardestinatiónir.

– Vit flúgva um alt Europa, allastaðni, har frítíðarstøð eru. Arbeiðstíðin er fimm dagar til arbeiðis, fýra dagar frí, og ferian er fýra vikur, men hon kann jú ikki liggja í sesongini, tí tá skulu flogfeløgini vinna pengar, so mín feria verður um veturin, sigur Tommy Andreasen.

Tað, sum liggur í kortunum, er, at Tommy skal byrja flúgvingina síðst í august. Og tá er bóndaaspiranturin veruliga vorðin flogskipari.